# Í kvøld verður stóra uppgerðin

**Tað er stórt sannlíki fyri, at eitt av teimum trimum, sum framvegis kappast um DM, í kvøld fer at verða lorað burtur úr kappingini**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*



*Lítil ivi er um, at Parkin aftur hesaferð verður stúgvandi full. Og tað sama verður helst galdandi fyri sofurnar framman fyri hópin av sjónvarpsskíggjum*

Brúðarvígslan í morgin er ivaleyst størsta samrøðuevnið í Danmark í løtuni. Men tað verður eisini tosað og skrivað nógv um fótbólt. Ikki minst í dag nú fjórði síðsta umfarið er á skránni. Oddaliðið Esbjerg fer í kvøld at spæla á útivølli í Herfølge, har heimaliðið hevur brúk fyri at fáa stig burturúr, um teir ikki skulu detta niður um strikuna.

Esbjerg verður sjálvsagt roknað at vera favorittur at vinna í Herfølge. Meiri spennandi er tað, hvussu tað fer at tørna út í Parkini, har FCK fer at taka ímóti Brøndby. Hóast tað framvegis verða trý umfør eftir at spæla, tá ið dystirnir í kvøld vera loknir, so verður tað mett lítið at ivast í, at taparin í Parkini í kvøld fer at hava sera smáar møguleikar at vinna DM. FCK og Brøndby hava bæði 58 stig, meðan Esbjerg hevur 59 stig. Øll tey fjøruti túsund atgongumerkini til setrini í Parkini í kvøld eru útseld fyri langari tíð síðani.

Í miðlunum verður mett, at FCK er favorittur at vinna, og tað verður mett at vera lítið sannlíkt, at tað ikki fara at verða skorað mál. Hvørja ferð hesi bæði liðini hava dystast síðani í 1992, hava tað verið skorað mál.

At miðlarnir rokna við, at FCK fer at vinna, grunda teir á hagtølini og á gongdina higartil í vár. Brøndby hevur ikki vunnið á FCK síðani 6. september í 2001, og teir hava ikki vunnið í Parkini síðani í mai í 1998 ella fyri seks árum síðani.

Hagtølini, sum tala ímóti FCK sigri, eru tey hjá Toda og teimum á heimavølli. Í hesum kappingarárinum hevur FCK bara fingið 25 av 45 møguligum stigum í Parkini.

Eins deyð er annars breyð, plagar at verða tikið til. Møguleikarnir hjá Toda Jónsson at sleppa framat í endaspurtinum í superliguni eru ikki vornir minni, eftir at tað mánadagin varð greitt, at Zuma ikki verður førur fyri at spæla í kvøld og kanska als ikki verður førur fyri at spæla tær báðar vikurnar, sum eru eftir at hesum kappingarárinum.

### Torførur setningur

Tá avbjóðingarnar hjá teimum trimum oddaliðunum verða sammettar, so er lítil ivi um, at FCK eigur størstu uppgávurnar á. Sunnudagin skulu teir spæla í Esbjerg, og aftaná steypafinaluna ímóti AaB, skulu teir spæla á heimavølli ímóti AaB og á útivølli ímóti FCN.

Esbjerg skal í kvøld spæla í Herfølge og sunnudagin á heimavølli ímóti FCK. Í tveimum teimum síðstu umførunum skulu teir spæla á útivølli ímóti FCM (hetta verður roknaður sum sera torførur dystur) og á heimavølli ímóti Frem.

Umframt í Parkini í kvøld skal Brøndby spæla á heimavølli ímóti FCM, á útivølli ímóti Frem og á heimavølli ímóti AB. Um Brøndby fer at megna at vinna í kvøld, og um Esbjerg ikki fær fult í einum av sínum dystum, so fer tað at síggja rættuliga væl út hjá Brøndby, sum á pappírinum eigur lættar uppgávur í síðstu umførunum.

### Nógv í kassanum

Áhugin fyri superliguni økist við stórari ferð í Danmark. Hetta kemst eitt nú av, at TV3, TV3+ og Viasat sport gera nógv burturúr fótbóltinum.

Í kvøld ella rættari longu seinnapartin í dag fer TV3+ at spreingja øll mørk. Teir fara at senda frá fótbólti longu klokkan fýra seinnapartin, og teir fara ikki at helma í aftur fyrrenn klokkan hálvgum ellivu í kvøld. Beinleiðis frásøgn verður frá lokalbrakinum í Parkini. Har fer bólturin á rull klokkan sjey.

# Liðskiparin visti einki

**Birgir Joensen, sum er liðskipari hjá FS Vágum, væntar ikki, at broytta framtiíðin fer at ávirka leikararnar nakað serligt í ár**

FS VÁGAR
*Jákup Mørk*

Tað var ein heldur skakkur liðskipari hjá FS Vágum, sum í gjár varð uppringdur av nevndini hjá felagsliðnum.

– Eg varð ringdur upp um hálvgum sjey tíðina, og fekk at vita, at MB hevði tikið seg úr samstarvinum við FS. Eg visti so ikki nakað sum helst um hetta, men sum eg havi skilt tað, so var kanska onkrir aðrir, sum høvdu varhugan av tí, sigur Birgir Joensen.

Og Birgir tykist eisini vera skjótur at staðfesta, at fyri sær tykist tað sera løgið, at samstarvið so brádliga skal slitna, uttan at partarnir í málinum eru kunnaðir um tað.



*- Eg rokni ikki við, at hetta fer at ávirka spælið. Har rokni eg við, at vit framhaldandi fara at stríðast eins væl, sigur liðskiparin hjá FS Vágum, Birgir Joensen*

### Avrikini verða óbroytt

Enn eru tó í minsta lagi 16 dystir eftir at leika, áðrenn kappingarárið er liðugt, og fram til hetta, so skulu leikararnir í FS Vágum stríðast saman. Líka mikið um hesir eru úr Miðvági, Sandavági ella sum hjá Birgir, úr Sørvági.

*Roknar tú ikki við, at hetta kann gerast nakað, sum fer at ávirka liðið negativt?*

– Nei. Tað haldi eg ikki. Sjálvandi vita leikararnir nú av, at umstøðurnar í framtíðini verða broyttar. Tað er sjálvandi óheppið í sjálvum sær, men eg rokni tó ikki við, at hetta fer at ávirka spælið. Har rokni eg við, at vit framhaldandi fara at stríðast eins væl, sigur hann.

*Men eftir kappingina skulu tit so leika innanhýsis um, hvar ávíkavist MB og SÍF skulu spæla. Verður tað ikki ein margháttlig støða, og hvussu fert tú sum liðskipari og sørvingur at fyrihalda teg í hesum?*

– Eg kann so bara siga tað, at eg fari so aldrin at stuðla MB í einum slíkum dysti. Eg dugi snøgt sagt ikki at síggja, hvussu MB nakran tíð skal megna nakað einsamalt, er kontanta svarið frá liðskiparanum til hetta seinasta.

## Upphiting og stórskíggi

Tað skerst ikki burtur, at ein fittur av teimum mongu føroyingum, sum búleikast niðri, eru sera fótbóltshugaðir. Tí er áhugin fyri brakinum í Parkini sum vera man stórur, og at føroyingar so eiga part í FKC-liðnum, ger hann neyvan minni.

Á føroyska náttklubbanum í danska høvuðsstaðnum, Jacques, fara tey eisini at syrgja fyri, at so nógvir føroyingar sum gjørligt fáa fylgt við dystinum.

Sum vant, so verður talan um upphiting til brakið, og longu 16.30 lata dyrnar upp til hetta. Hjá teimum, sum síðani ætla sær í Parkina, er møguleiki at taka buss beinleiðis til Parkina, og hevur tú einki atgongumerki, so er heldur ikki at falla í fátt. Tey hava nevnliga fingið fatur í tveimum stórskíggjum, soleiðis at øll væl og virðiliga kunnu fylgja við í tí, sum fyriferst, og eftir dystin standa dyrnar framvegis opnar, so eisini tá verður talan væntandi um nógv fótbóltsprát á staðnum.

-jm



# Okkara grundarlag er í lagi



*Føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, er ósamdur við teimum, sum halda, at hann og hjálparvenjari hansara Jógvan Martin Olsen ikki hava grundarlag fyri at úttaka føroyska landsliðIð*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, er ósamdur við teimum, sum í blaðnum í gjár bóru fram, at landsliðsvenjarin og hjálparvenjari hansara einki grundarlag havi fyri landsliðsúttøkunum**

LANDSLIÐIÐ
*Terji Nielsen,*
*terji@sosialurin.fo*

Í blaðnum í gjár vóru røddir frammi, sum settu spurnartekin við grundarlagi hjá landsliðsvenjaranum Henrik Larsen og hjálparvenjara hansara Jógvan Martin Olsen fyri at taka út teir bestu leikararnar til føroyska landsliðið. Danski høvuðsvenjarin sigur tó, at eftir hansara tykki er hetta ikki nakar trupulleiki.

### Meiningarnar eru nógvar

Henrik Larsen sigur, at allastaðnis í heiminum eru tað túsundtals meiningar um, hvussu eitt fótbóltslið stendur seg best. At fólk halda tað verða skeivt, soleiðis sum skipanin við venjaraparinum er í løtuni, hevur hann sum so ikki nakrar serligar viðmerkingar til, tí tað er soleiðis, at Fótbóltsamband Føroya hevur valt at arbeiða.

Stóri danin sær tað ikki sum nakran trupulleika, at hjálparvenjarin, Jógvan Martin Olsen, eisini er venjari hjá einum føroyskum 1. deildarfelagi. Eg haldi, at tað er í lagi, at Jógvan Martin er venjari hjá NSÍ, tí tað eru so fá feløg og leikarar í Føroyum, at hann saktans fær hildið eyga við landsliðsleikarum javnan, millum annað tá ið teir leika móti NSÍ, sigur Henrik Larsen. Somuleiðis sigur landsliðsvenjarin, at eftir hansara tykki er Jógvan Martin ein so dugnaligur venjari, ið hevur sera stórt innlit í føroyskan fótbólt og føroyskar leikarar, at hann er sera væl skikkaður sum hjálparvenjari á landsliðnum.

At Henrik Larsen ikki sær nóg nógv til føroyskan fótbólt, er landsliðsvenjarin heldur ikki samdur í. Hann sigur, at hóast kappingin ikki er meiri enn byrjað, so hevur hann longu sæð tey allarflestu landsliðsevnini í ár og vísir á, at hann hevur heilt nógvar ferðir í Føroyum síðani vetrarsteðgin. Hvussu ofta hann hevur verið, dugir Henrik Larsen tó ikki at siga, men tað man tátta í tíggju ferðir seinastu tríggjar mánaðirnar. Tískil metir hann seg sjálvan verða rímuliga væl fyri, hvat viðvíkur gongdini hjá teimum einstøku spælarunum.

### Hevði fund við venjarar í vikuskiftinum

So seint sum undanfarna vikuskifti var Henrik Larsen í Føroyum og hugdi eftir dystum í steypakappingini. Eisini var ein fundur hildin við venjararnar hjá teimum føroysku 1. deildarfeløgunum, men her harmast landsliðsvenjarin um, at tað einans vóru 6 av teimum 10 venjarunum, ið møttu upp til fundin. Á fundinum vóru venjararnir hjá teimum ymisku feløgunum kunnaðir um, hvørjir leikarar í løtuni eru inni í myndini til landsliðið, og hvørjir eru á væl á veg.

At tað altíð eru teir somu leikararnir, ið verða úttiknir, er Henrik Larsen heldur ikki samdur í. Hann sigur, at sjálvsagt er ein stamma á liðnum, men útskiftingar eru eisini í hópinum. Vit arbeiða við einum bruttohópi upp á okkurt 35 leikarar, men undan hvørjum einkultum dysti úttaka vit teir 18 leikarar, ið vit meta kunnu gera tað best fyri føroyskan fótbólt bæði í løtuni og í framtíðini, sigur Henrik Larsen. At vit hava henda bruttohóp, merkir tó ikki, at aðrir leikarar ikki eru inni í myndini, tí tað eru heilt nógvir leikarar upp á tal, sigur hann. Sjálvur heldur Henrik Larsen, at liðið og úrslitini seinastu árini vísa, at føroyska landsliðið er á rættari kós.

### Gevur kanska FSF okkurt at hugsa um

At fólk koma fram við sínum hugsanum, hevur føroyski landsliðsvenjarin einki ímóti. Hann sigur tað verða í fínasta lagi, at tað eru ymsar meiningar um landsliðsarbeiðið, tí tað vísir, at tað er áhugi fyri føroyska landsliðnum.

Henrik Larsen sigur seg ikki hava nakran trupulleika við at ferðast millum Danmark og Føroyar, heldur enn at búsita seg her á klettunum. Tó sigur hann, at tað kanska er vert hjá FSF at umhugsa, um teir skulu seta tað sum krav, næstu ferð ein landsliðsvenjari verður settur, men hetta er nakað, sum leiðslan í FSF skal avgerða á einum nevndarfundi, og sum eg ikki skal blanda meg uppí, sigur hann. Eg eri settur undir nøkrum treytum, sum FSF hevur ásett, og so kunnu fólk verða samd ella ósamd í teimum treytunum, um tey vilja tað, sigur Henrik Larsen.

### Fyrireika seg til Hollands-dystin

Næsta uppgávan hjá føroyska fótbóltslandsliðnum er spennandi venjingardysturin ímóti Hollandi, sum verður leiktur í Sveiss tann 1. juni. Føroyski landsliðsvenjarin sigur, at hópurin til henda dyst verður úttikin fyrst í næstu viku, men tað er enn ógreitt, hvussu tað verður við summum av útisetunum. Leikdagurin er ikki UEFA-góðkendur leikdagur, og tí hava feløgini ikki skyldu til at lata sínar spælarar leysar til dystin. Bæði í Danmark og í Íslandi verður spælt dagin fyri sjálvan landsdystin, og tí er ógreitt, hvussu verður við eitt nú Julian Johnsson, Hans Fróða Hansen, Fróða Benjaminsen og Johan Byrial Hansen, sigur Henrik Larsen, sum tó vónar, at leikararnir fáa frí, tí talan er um ein sjáldsama áhugaverdan dyst, sum verður eitt minni fyri allar leikararnar.